**Tíðindaskriv 05/2014 – Rakstur**

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Apríl, 2014

## SOPEP: Fyribyrgjan av dálking – Kontaktupplýsingar til lond

Í yvirlitinum yvir feilir, ið verða skrásettir undir kanningum í fremmandari havn (PSC) sæst, at eitt av afturvendandi frávikunum, at SOPEP er ikki í lagi. Ofta merkir hetta, at SOPEP er ikki dagførd við seinastu útgávuni av IMO-skrivinum **MSC-MEPC.6/Circ.12**.

Síðst í hvørjum ársfjórðingi verður nýggj útgáva av hesum skrivi løgd út á heimasíðurnar hjá IMO. Av hjálagda sæst, at nýggjast skrivið er dagfest 31. mars 2014. Hetta lagt út fyrst í apríl og kom í staðin fyri tað gamla, sum var tøkt frá fyrst í januar.

Sjóvinnustýrið skal við hesum minna reiðarí, rakstrarfeløg og skiparar á, at hvønn ársfjórðing skal SOPEP umborð á skipinum dagførast, við at nýggjasta útgávan av hjálagda lista verður løgd inn og gamla útgáva koyrt burtur.

Fyri at sleppa undan hesi afturvendandi viðmerking – "SOPEP not as required" – er tað eitt gott hugskot at leggja eina sjálvvirkandi áminning inn í SMS-skipanina, ið minnir umsitaran á at fara inn á síðurnar hjá IMO eftir dagførdu útgávuni av MSC-MEPC.6/12.

Hjálagt: MSC-MEPC.6/Circ.12 - National Contact Points For Safety and Pollution Prevention & Response

--- 000 ---